# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# 19 ára gamal í Gallerie Focus

**Jóhan Martin Christiansen er bert 9 ára gamal, men longu vælumtóktur listarmaður. Hetta kemst av hansara sermerktu listaverkum, ið júst nú verða sýnd fram í Gallerie Focus hjá Marionnu Norðoy**



*Ungi listamaðurin, Jóhan Martin Christiansen, við einum av málningum sínum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

MÁLINGALIST

*Bjørk Maria Krog Olsen, praktikantur*
*redaktion@sosialurin.fo*

Jóhan Martin gongur á triðja ári á Studentaskúlanum í Hoydølum og hevur ætlanir um at fara niður á listaskúla í Holbæk saman við Áslu Rannvá Svensson, sum hann fyrr hevur havt framsýning saman við. Síðani hevur hann í huga at fara á hægri lærustovn innan list.

At tekna og mála hevur víst Jóhan Martini áhuga, síðan hann var smádrongur. Sum 15 ára gamal fór hann á eitt heldur óvanligt starvsvenjingarpláss hjá Torbirni Olsen. Hetta gav honum íblástur og lærdi hann at arbeiða við litum, strokum og so framvegis. Síðan hetta og fýra ár fram gekk hann á kvøldskúla hjá Jónu Rasmussen, har hann varð lærdur í grafikki.

Marianna Norðoy sigur frá, at ikki nógv sleppa at sýna fram í atlieri hennara, tí hon er burtur fimm mánaðar um árið.

– Nógv listafólk koma og vilja sýna fram her, men oftani má eg geva teimum eitt nei. Sermerkt list raðfesti eg sera høgt, og eftir hesum velji eg listafólkini, ið sleppa at sýna fram. Eg kann tó eisini vera erlig og siga, at eg ofta velji listafólk, ið eisini selja, tí at atlierið er ikki nøkur fíggjarlig rósa, sigur Marianna Norðoy, sum hevur bookað Galerie Focus heilt fram til 2009.

### Sermerkt listaverk

– Eg havi valt listaverkini hjá Jóhan Martini fyrst og fremst tí, at tey eru sermerkt, men eisini tí, at eg kann hyggja upp á tey og hugsa um viðurskiftini og søgurnar, ið liggja aftanfyri, sigur Marianna Norðoy, ið er gift við kenda listamanninum, Amariel Norðoy.

Marianna tekur 45 prosent av øllum, ið verður selt.

– Hetta helt eg vera eitt sindur ógvusligt, men Marianna skipar fyri øllum og ger alt, og hetta eri eg sera fegin um, sigur ungi listamaðurin.

Jóhan Martin hevur oftani havt listaframsýning kring oyggjarnar. Bæði á Varmakeldu, G!, Ólavsøkuframsýningini, Smiðjuni í Lítluvík og aðrastaðni hava havt verk hjá unga listamanninum.

Neiligar viðmerkingar verða givnar, tá ið talan er um umstøðurnar fyri listina í Føroyum. Hvat heldur Jóhan Martin Christiansen um hetta:

- Mong grenja um, at ov ringar umstøður eru fyri myndlistina í Føroyum, og at ítróttur verður tikin fram um. Hetta eri eg partvís samdur í, men tað nyttar heldur ikki at sita og taka synd í sær sjálvum. Mann noyðist at arbeiða fyri tí sjálvur, sigur ein álvarsamur Jóhan Martin.

– Man kann, um man veruliga vil.

At vera listafólk er ikki altíð lætt fíggjarliga, men hesum varnast Jóhan Martin ikki.

- Eg selji væl, so eg merki einki serligt til tað.

- Tú hevur so heldur ikki hús, børn og bil, skoytir Marianna upp í og flennur.

Framsýningin hjá Jóhan Martin Christiansen letur upp fríggjadagin 30. mars og verður at síggja fram til 12. apríl. Jóhan Martin hevur egið atlier á Saltsøluni, og eisini har eru fólk vælkomin at traðka inn um gátt.

# Í audiens hjá Toda



*Bogi Borg er hondbóltsleikari, men var kortini komin at lurta eftir fótbóltsleikaranum, Toda Jónssýni, tá hann tók ímóti ungum føroyingum millum 18-25 ár í Eik í gjár*

**20 ára gamli Bogi Berg var til móttøkuna hjá Toda Jónssyni, ið var hildin í EIK í gjár**

*Orð og Myndir:*
*Erla Torvadal, praktikantur*
*redaktion@sosialurin.fo*

Bogi spælir hondbólt og gongur á handilsskúla. Sjálvt um hann ikki spælir fótbólt, dámar honum sum heild væl fótbólt.

Hví valdi tú at koma á fyrilestur hjá Toda Jónsson?

- Eg kom, so eg slapp at hitta Toda og samstundis seta honum nakrar spurningar um fótbóltslívið og fáa at vita, hvat tað krevur at gerast yrkisleikari.

Hvat heldur tú um tey mál, ið Todi setti sær, sum ungur?

- Sum ungur søgdu øll, at hann ikki fór at gerast yrkisleikari. Tó var hann sjálvsikkur og gav ikki upp, og í dag síggja vit, hvussu langt hann er komin, kortini. Eisini haldi eg, at tað er flott at hann er komin so langt.

Er tað týdningarmikið at hava eina útbúgving, sjálvt um ein kann fáa stóra inntøku á annað hátt?

- Ja, avgjørt. Tað er týdningarmikið, at ein hevur eina útbúgving. Taka vit Toda sum dømi, so hevur hann onga útbúgving, og tað kann kanska ávirka hann, tá hann ikki spælir fótbólt longur.

Hevur tú nakrar vónir fyri framman?

- Ja, eg ættli mær at arbeiða okkurt innanfyri business.

Er Todi tín fyrimynd?

- Fyrimynd og fyrimynd? Hann er ikki beinleiðis mítt idol, men eg meti hann høgt, at hann er komin so langt.